# Dýrari at sigla

Fyrr í vikuni boðað reiðaríið Color Line frá, at ferjan Prinsesse Ragnhild verður tikin úr siglingini millum Oslo og Hirtshals, tí reiðaríið gevst við teirri rutuni. Hinvegimn heldur reiðaríið fram at sigla millum Vesturnoreg og Norðurjútland. Ingvar Fardal, sum er stjóri í reiðarínum Fjord Line, sigur við norsk bløð, at avgerðin hjá Color Line fer uttan iva at hava við sær, at tað verður dýrari at sigla millum Oslo og Norðurjútland í framtíðini.

# Seismikkur drepur yngul

Felagið hjá norsku fiskakeyparunum mælir myndugleikunum frá at geva oljufeløgum loyvi til at gera seismiskar kanningar úti fyri Lofoten og Vesterålen tann næsta mánaðin. Fiskakeypararnir siga, at ein stórur partur av strandartoskinum gýtir í mai, og at yngulin fer norður við Lofoten og Vesterålen fleiri vikur seinni. Tí stúra keypararnir fyri, at sleppa oljufeløgini at skjóta seismikk har tá, fara fleiri hundrað milliónir yngul fyri bakka.



*Seismikkskjóting kann drepa nógvar milliónir toskayngul (Mynd: Nordlys)*

# Frítíðarfisking kann gerast lønandi vinna

**Í nøkur ár hevur verið tosað um at skipa havfisking sum frítíðarvinnu í Føroyum, og í 2006 fekk táverandi Ferðaráð Føroya eina hálva miljón krónur játtaða frá Vinnuframagrunninum til eina 2-ára verkætlan. Hetta gjørdist startskotið, og síðan hevur stovnurin arbeitt við at menna og marknaðarføra "sports fishing" við Føroyar**

FRÍTÍÐARFISKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Verkætlanin, sum botnur varð lagdur undir við játtanini til menning av frítíðarfiskiskapi í Føroyum, er brúkt í arbeiðnum fram ímóti at menna eitt dygdargott ferðavinnutilboð, og fyrireikingarnar til at skipa eina málrættaða marknaðarføring á hesum øki eru alsamt í gongd.

SamVit hevur skrivað frágreiðing um arbeiði, sum higartil er gjørt, og stovnurin hevur eisini gjørt kanningar um frítíðarfiskiskap.

## Á byrjunarstigi

Stovnurin hevur gjørt kanningararbeiði, har serstaka umhvørviðhjámálbólkinum er kannað, og bygt er eitt netverk við lyklapersónum, lyklamiðlum og øðrum, sum kann verða eini framtíðarmenning og marknaðarføring til gagns.

Skipað hevur verið fyri evnisdøgum, og fundir hava verið, kunningartilfar er framleitt og er í framleiðslu, samband er fingið við serkøn innan havfisking, og ein strategibólkur hevur sitið, sum skal gera miðvísa ætlan fyri framtíðar menning og marknaðarføring av havfisking í Føroyum.

Í síni frágreiðing um frítíðarhavfisking, ásannar SamVit, at frítíðarfiskiskapur í Føroyum er á byrjunarstigi, men við skilagóðum samstarvi og arbeiði á fleiri økjum, kann hetta gerast ein vinna við stórum fíggjarligum møguleikum.

Høvuðsmarknaðurin telir fleiri enn 50 miljónir fólk, og tað eru serliga nakrir ávísir bólkar av ferðandi, sum hava føroyskan áhuga.

## Áhugin veksandi

"Yes! Her býtur á! Nú er at geva tol, berjast við fiskin, draga dýrið inn og síggja, hvussu stórur fongurin er…"

Soleiðis byrjar SamVit ein samandrátt, sum stovnurin gjørdi fyri eini tíð síðan í sambandi við kanningin av havfisking sum frítíðarvinnu í Føroyum.

Víst verður á, at spenningurin við stuttleikafiskiskapi er grundleggjandi menniskjaligur og heimsfevnandi, sum tikið verður til, og áhugin fyri at gera frítíðarhavfiskiskap til eina týðandi vinnugrein í Føroyum er veksandi.

SamVit vísti á, at fyrstu stigini móti eini veruligari "professionalisering" av frítíðarhavfiskiskapi eru tikin – men enn er langt á mál.

- Vit eru á byrjunarstigi. Í stuttum er neyðugt, at skiparar/ bátaeigarar fáa fleiri royndir og førleikar. Tænastan og vitanin um stuttleikafiskiskap við tøkni, útgerð og annað á sjónum er ikki á nøktandi støði enn.

## Ein "nisja"

Stuttleikafiskiskapur er sum heild ein sermarknaður innan ferðavinnu, ein sonevnd "nisja", men hetta er kortini ein stórur marknaður.

Í frágreiðing síni vísti SamVit á, at føroyska ferðavinnan hevur avmarknaðar fíggjarligar karmar, og tí er neyðugt við ávísum marknaðarfokus, sum tikið verður til.

Teir marknaðir, sum eru serliga áhugaverdir innan stuttleikafiskiskap, eru Ongland, Danmark, Noreg, Svøríki, Niðurlond, Belgia, Frakland, Týskland, USA, Avstralia og Kanada.

SamVit heldur, at marknaðarfokus í fyrsta lagi eigur at liggja í trímum høvuðsbólkum av ferðandi; stuttleikahavfiskarum, familjusegmentinum og sonevnda adventure light-slagnum.

- Við at leggja serligan dent á hesar bólkar, ber til at fara undir miðvísa marknaðarførslu og sølu á júst hesum økjum, sigur SamVit.

Tað eru serliga fýra virði, ið stovnurin heldur eiga at vera tað berandi í eini føroyskari ferðavinnu; tað er dygd, reinleiki, avbjóðing og burðardygd.

- Vit eiga at stremba eftir at menna eina dygdarvøru frá byrjan til enda – eina heildaruppliving, har eisini gisting, flutningur og annað eru fyrireikað í mun til júst einstaka stuttleikafiskaran, sigur SamVit.

Skulu føroyingar byggja upp eina lønandi vinnu innan frítíðarfiskiskap, sum klárar seg í hørðu altjóða kappingini, er alneyðugt við samstarvi.

- Hetta er galdandi bæði fyri tey, sum arbeiða við at skipa ferðirnar, bátaeigarar og almennar/ politiskar myndugleikar, sigur SamVit.



*Spenningurin við stuttleikafiskiskapi er grundleggjandi menniskjaligur og heimsfevnandi, og áhugin fyri at gera frítíðarhavfiskiskap til eina týðandi vinnugrein í Føroyum er veksandi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*- Í fyrsta lagi verður báturin sjeinaður upp, samstundis sum ymiskar ábøtur og umvælingar verða gjørdar – og so er tað góðkenningin hjá Skipaeftirlitinum, sigur Magni Blástein, sum miðjar eftir, at báturin verður klárur fyrst í mai*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*



*Hann er ein av teimum, sum sær stórt potentiali og stórar møguleikar í, at ferðafólk, sum dáma at fiska, koma higar til land*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

sjónum, og her eru nógvir møguleikar. Ein er at vísa teimum lívið við havbotnin. Vit kunnu seta nakrar rúsur og taka tær uppaftur, tá ein tíð er fráliðin. Meðan bíðað verður, kunnu vit sigla og fiska eitt sindur.

Hann vísir á, at á eini slíkari ferð við skúlaflokkum verður tað eisini upp til læraran, hvussu kreativur hann er. Á ferðini verður eisini høvi til at kunna næmingarnar um eitt nú um lívfrøði, landalæru, náttúru og tøkni.

- Her eru nógvir møguleikar. Tað ræður bert um hugflogið, ásannar Magni.

Hann heldur, at høvi hjá skúlaflokkunum at sleppa við bátinum serliga er tíðliga um summarið, áðrenn skúlarnir fara í summarfrí – og so aftur um heystið, tá ið næmingarnir eru farnir í skúla aftur eftir summarfrítíðina.

## Vegurin er samstarv

Nú Fiskivinnuskúli er í Vestmanna, hugsar ferðavinnumaðurin eisini um møguleikarnar at samstarva við skúlan, tí tað er so upplagt, heldur hann.

Í aðrar mátar ætlar Magni at samstarva við ferðavinnuna, sum longu er í Vestmanna.

- Eg arbeiði longu saman við teimum, sum eru í hesi vinnu í bygdini, og eg ivist onga løtu í, at samstarv er vegurin fram hjá føroysku ferðavinnuni í síni heild, sigur Magni Blástein.